## Vann hálva millión í Activ

Á Kiosk Activ í Havn fingu tey í gjár fráboðan um, at ein kundi, sum hevur spælt hjá teimum, hevði 12 rætt á kuponini herfyri, og lønin fyri ómakin er 500.000 krónur. Tann 8. november var føroyski spælarin einsamallur um at raka 12 rætt, og tað gav honum høvuðsvinningin. Tips12 er hvønn sunnudag, og bæði í teirru puljuni og í puljuni til 13 dystir er jackpot komandi vikuskiftið, tá eingin tippari hevði allar dystirnar rættar seinasta vikuskiftið.




## USA vil hava HM

Saman við níggju øðrum londum er USA nú við í kapprenningini um at hýsa HM-endaspælinum í fótbólti í 2018 ella 2022. Ein hending, sum sambært amerikansku nevndini, sum arbeiðir við málinum, kann skapa inntøkur fyri fimm milliardir dollars og skapa 100.000 arbeiðspláss. Millum teirra, sum eru í nevndini, sum skal fyrireika amerikonsku umsóknina, eru somikið mætir menn sum Henry Kissinger, Robert Kraft og Arnold Schwarzenegger.

# Rafa er púra vísur í top-4

**Venjarin hjá Liverpool sigur seg við vissu kunna staðfesta, at felagið aftur í ár verður millum tey fýra bestu í Onglandi**




Jákup Mørk

Hóast Liverpool í løtuni hevur hagtøl, sum staðfesta, at liðið bert hevur vunnið tríggjar av seinastu 15 dystunum, og hóast støðan í Premier League er alt annað enn nøktandi hjá felagnum, so noktar Rafael Benitez fyri at vera dapurskygdur.

- Tað týdningarmesta er, at vit støðugt betra okkum. Seinastu fimm árini hava vit styrkt felagið á øllum økjum, og tað mugu vit ikki tveita fyri borð, bara tí tað beint nú gongst minni væl.

- Vit mugu framvegis arbeiða hart og miðvíst, og talan er bert um heilt smáar lutir, sum skulu betrast, áðrenn úrslitini aftur eru við okkum.

- Enn eru 22 dystir eftir at spæla, og eg kann siga fyri vist, at vit verða í top-4 við kappingarlok. Vit hava eitt lið, sum er nógv sterkari enn tað, sum vit hava víst í seinastuni, sigur Rafael Benitez.

### Villa hóttir

Samstundis er Aston Villa í fullari ferð við at bróta dominansin, sum tey fýra stóru hava havt í Onglandi seinastu nógvu árini.

Útisigurin á Old Trafford leygardagin undirstrikaði, at Aston Villa hevur potentialið, og í gjár lupu teir upp á triðjaplássið við sigri móti Sunderland.

Ein av teimum, sum væl dugir at síggja Aston Villa millum heiðursmerkini, er Carlos Ancelotti, venjari hjá Chelsea.

- Aston Villa hevur eitt sera vandamikið lið, sum Liverpool og kanska eisini Arsenal skulu vara seg fyri. Teir vunnu móti okkum og teir vunnu móti Manchester United, og sjálvur haldi eg, at Martin O'Neill hevur gjørt eitt framúrskarandi arbeiði í felagnum, sigur Ancelotti.



**Í dag spælir Liverpool á heimavølli móti Wigan. Flestu eygleiðarar eru á einum máli um, at alt annað enn ein sigur vil gera kritikkin móti Benitez harðari, enn gott er**

# Nummar 900 hjá Sir Alex

**Alwx Ferguson stóð í gjár á odda fyri sínum 900. dysti fyri Manchester United. Við tryggum sigri á einum skerdum Wolverhampton vunnu meistararnir seg ájavnt Chelsea, sum spælir í kvøld**




Jákup Mørk

Seinasti parturin av desember er ofta tíðin, har skilnaður kemur í oddin í ensku Premier League. Og sjálvur hevur Sir Alex Ferguson ofta tikið til, at tað er júst í tøttu jólaskránni, at meistarin verður funnin.

Í so máta kundi venjarin hjá Manchester United ikki ynskt sær betri byrjan, tá tað í gjár eydnaðist at vinna 3-0 á útivølli móti Wolves í dystinum, sum var nummar 900 hjá Sir Alex sum venjara í Manchester.

Kringstøðurnar vóru tó kanska heldur merkisverdar. Wolves vann um vikuskiftið á útivølli móti Tottenham, men hóast hetta hevði Mick McCarthy valt at skifta 10 spælarar út í mun til tann dystin. Orsøkin var, at Wolves longu leygardagin hevur sera týðandi dyst móti Burnley, og roknað verður við, at hetta verður ein av dystunum, sum kann gerast heilt avgerandi í botnstríðnum.

Men tey fyrilitini blíðkaðu ikki heimaáskoðararnar. Støðugt róptu tey, at tey vildu hava síni £40 pund aftur, og hóast eykaliðið hjá Wolves royndi at stríðast, so megnaðu teir lítið móti gestunum, sum við málum frá Rooney, Vidic og Valencia skutu seg ájavnt Chelsea í oddinum.

Í botninum vann Bolton sera týðandi sigur á West Ham. Eitt úrslit, sum bar við sær, at liðini hoppaðu hvør sín veg um niðurflytingarstrikuna.

### Úrslitini í Premier League

**Týkvøldið**

| | |
|---|---|
| Sunderland-Aston Villa | 0-2 |
| Birmingham-Blackburn | 2-1 |
| Bolton-West Ham | 3-1 |
| Manchester Utd.-Wolves | 3-0 |

**Mikukvøldið**

Burnley-Arsenal
Chelsea-Portsmouth
Liverpool-Wigan
Tottenham-Manchester City

### Premier League

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 16 | 12 | - | 1 | - | 3 | 40 | 13 | 27 | 37 |
| 2 Man Utd. | 17 | 12 | - | 1 | - | 4 | 37 | 14 | 23 | 37 |
| 3 Aston Villa | 17 | 9 | - | 5 | - | 3 | 28 | 14 | 14 | 32 |
| 4 Arsenal | 15 | 10 | - | 1 | - | 4 | 40 | 19 | 21 | 31 |
| 5 Tottenham | 16 | 8 | - | 3 | - | 5 | 35 | 22 | 13 | 27 |
| 6 Birmingham | 17 | 8 | - | 3 | - | 6 | 18 | 17 | 1 | 27 |
| 7 Man City | 15 | 6 | - | 8 | - | 1 | 29 | 21 | 8 | 26 |
| 8 Liverpool | 16 | 7 | - | 3 | - | 6 | 32 | 22 | 10 | 24 |
| 9 Fulham | 16 | 6 | - | 5 | - | 5 | 20 | 17 | 3 | 23 |
| 10 Sunderland | 17 | 6 | - | 3 | - | 8 | 22 | 24 | -2 | 21 |
| 11 Stoke | 16 | 5 | - | 6 | - | 5 | 15 | 19 | -4 | 21 |
| 12 Blackburn | 17 | 5 | - | 4 | - | 8 | 17 | 30 | -13 | 19 |
| 13 Burnley | 16 | 5 | - | 3 | - | 8 | 20 | 34 | -14 | 18 |
| 14 Wigan | 16 | 5 | - | 3 | - | 8 | 19 | 36 | -17 | 18 |
| 15 Everton | 16 | 4 | - | 5 | - | 7 | 22 | 30 | -8 | 17 |
| 16 Hull | 17 | 4 | - | 5 | - | 8 | 17 | 34 | -17 | 17 |
| 17 Bolton | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 23 | 33 | -10 | 16 |
| 18 Wolves | 17 | 4 | - | 4 | - | 9 | 15 | 31 | -16 | 16 |
| 19 West Ham | 17 | 3 | - | 5 | - | 9 | 25 | 34 | -9 | 14 |
| 20 Portsmouth | 16 | 3 | - | 2 | - | 11 | 14 | 24 | -10 | 11 |